# Kommunufelagið mótmælir harðliga ósakligari viðgerð

FØROYA KOMMUNUFELAG

**– Stýri felagsins vil harðliga mótmæla tí ósakligu viðger ið kommunur og kommunupolitikkarar fáa á Føroya løgtingi, sigur Føroya Kommunufelag í tíðindaskrivi**

Landsskatturin er lækkaður støðugt síðani 1995. Samstundis er kommunuskatturin vaksin. Hetta vóru boðini frá Jørgin Niclasen løgtingslimi av løgtingsins røðarapalli 8 mars 2006. Tí ynsktu fleiri tinglimir, at hvør einstakur borgari á sínum lønarseðli sá, hvat viðkomandi skuldi gjalda í ávíkavist kommunu- og landsskatti.

Føroya Kommunfelag hevur als einki ímóti at tann einstaki sær hvussu lutfallið er ímillum kommunu- og landsskatt. Tað skal tó viðmerkjast at allir borgarar í dag í síni sjálvuppgávu síggja hvat teir gjalda í ávikavist lands- og kommunuskatti. Men verður tað mett átrokandi frá landsins síðu, at hetta verður at síggja í mánaðarliga lønarseðlinum hjá tí einstaka, so hava landsmynduleikarnir sjálvsagt fullan rætt at nýta pening til eina slíka skipan.

Men er tað nú veruligani so, at landsskatturin hevur verið fallandi síðani 1995 og kommunuskatturin vaksandi sama tíðarskeið?

Í 1995 vóru samlaðu skattainntøkurnar hjá landið og kommunum 1.418.825.000 kr. Av hesum var landsskatturin 740.475.000 og kommunuskatturin 678.350.000. Tíggju ár seinni, í 2005, var samlaða skattainntøkan hjá landið og kommunum 2.507.797.000 kr. Av hesum var landsskatturin 1.382.573.000

Ímeðan kommunuskatturin var 1.103.899.000.

Lutfallið ímillum kommunuskatt og landsskatt er sostatt broytt soleiðis:

Í 1995 fóru 52 % av goldnu skattakrónunum í landskassan. 10 ár seinni, í 2005 fóru heili 56 % av goldnu skattakrónunum í landskassan.

Við øðrum orðum, uppáhaldi hjá ávísum løgtingsmonnum um, at kommunurnar taka meira inn í skatti ímeðan landið letur skattalætta, er ikki í samsvar við veruleikan.

Fyri at hava eina nøktandi samanbering er eisini neyðugt at hava í huga at landið umframt skatt, tekur inn hópin av peningingi við avgjøldum av ymiskum slag.

Onnur avgjøld enn skattur eru vaksin úr góðum 600 mill til omanfyri 1300 mill kr. seinast 10 árini. Ein meirinntøka til Landskassan upp á fleiri enn 700 mill kr seinastu 10 árini.




Ein samlað samanbering av inntøkum hjá landskassa og kommunukassum seinast 10 árini er sostatt.

Inntøkurnar hjá kommununum er vaksnar **425 mill kr.** seinastu 10 árini, ímeðan intøkurnar hjá landinum eru vaksnar **1.342 mill kr.** seinastu 10 árini.

Í sama tíðarskeiði hava kommunurnar harumframt yvirtikið uppgávur sum til dømis barnaansing, ein uppgáva sum var fultkomuliga missrøkt, men sum kommunurnar síðani hava dagført fyri 100 tals milliónir, soleiðis at vit í dag hava eina vælvirkandi barnaansing.

At hoyra frá Løgtingslimum "at vit landspolitikarar skulu liggja og venda hvørjari krónu" ímeðan "Kommunurnar bara stilla skattaprosenti sum teimu lystir" (Citat. Kristian Magnussen), er sera hugstoytt fyri kommunupolitikkarar. At viðgera útskifting av flisum í gongugøtuni í Havn, og at koma til ta niðurstøða at kommunurnar eiga nok av pengum tí Tórshavnar kommunna hevur ráð at skifta flisar, sigur meira um sjónarringin hjá ávísum løgtingsmonnum, enn um fíggjarligu viðurskiftini hjá kommununum.

**At flyta uppgávur**

Í 2006 vóru uppgávur fluttar kommununum, eitt nú barnavernd og stuðulsfólk á dagstovnum, ið kostaðu uml. 55 mill kr,. Hetta merkir at landið ikki skal fíggja hesar uppgávur longur, og tí skal landið ikki longur krevja skatt inn, til at loysa hesar uppgávur fyri. Hinvegin hava kommunurnar samsvarandi yvirtikið uppgávur sum kosta 55 mill kr. Fyri at kunna fíggja hesar, so er sjálvsagt neyðugt at kommunurnar taka fleiri pengar inn í skatti. Hetta hevur verið sjálvsagt fyri allar partar higartil. At landsskatturin minkar og at kommunuskatturin kann vaksa samsvarandi uppgávukostnaðinum av tí uppgávu ið løgd verður út.

Men í Tinginum hósdagin var ta sum fyrr var sjálvsagt, ikki so sjálvssagt longur. Nú var funnist at kommunupolitikkarum fyri at hækka skattin, í samband við at kommunurnar høvdu yvirtikið uppgávur fyri 55 mill kr. Ætlanin hjá nøkrum løgtingslimum er eftir øllum at døma, at tá ið øki vera løgd kommununum at umsita so merkir hetta skattalætta. So einfaldur er politikkur tíðanverri ikki.

Føroya kommunufelag vil mæla til at viðurskiftini ímillum land og kommunur, og serliga fíggjarligu viðurskiftini fáa eina sakligari viðger, enn tað viðgerðina vit hoyrdu í Tinginum hósdagin.

Tað er neyðugt at økini framyvir vera løgt út undir skipaðum viðurskiftum. Kommunur og land eiga at koma ásamt hvørji øki skulu leggjast út, og í hvørjari raðfylgju økini skulu leggjast út. Tað er eisini alneyðugt at farið verður undir at útgreina tørvin á einari fíggjarligari útjavningarskipan ímillum kommunurnar í Føroyum. Orka átti at verið brúkt til at loyst hesar uppgávurnar, heldur enn at brúka tíð uppá einkisigandi kjak.

# Eingin er fullspottaður fyrr enn hann spottar seg sjálvan

FYRI LIMAKOMMUNURNAR Í KOMMUNUSAMSKIPAN FØROYA
Rodmundur Nielsen, formaður, borgarstjóri í Runavík
Heðin Mortensen, næstformaður, borgarstjóri í Tórshavn
Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri
Kristin S. Bech, borgarstjóri í Vági
Sigurð S. Simonsen, borgarstjóri í Fuglafirði
Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík

Í Løgtinginum í farnu viku royndu fleiri av landspolitikkarunum at fáa nógv umrødda skattalættan at sýnast størri enn hann er, við at kasta kommununum fíggjarligt ábyrgdarloysi fyri. – Hóast landspolitikkarar eyðvitað hava rætt til at halda lítið um síni egnu avrik, fáa teir onki burtur úr at peika eftir kommununum, uttan at fleiri fingrar peika aftur á teir sjálvar.

**Kommunuskattaprosentið**

Lat ongan iva vera um, at kommunurnar í KSF taka fult undir við, at størri gjøgnumskygni verður í skattaviðurskiftunum, soleiðis at borgarin sær, hvat av lønini fer í kommunuskatt og hvat fer í landsskatt. Men at tingmenn frá tingsins røðarapalli og fyri øllum Føroya fólki kasta kommununum fyri at áseta skattaprosent, sum teimum lystir, og brúka skattaborgarans pening til óneyðuga íløgur, kunnu vit ikki lata tað standa óátalað.

Tað er skeivt, tá tinglimir siga, at kommunuskattaprosentið er óneyðuga høgt – tvørtur ímóti hava kommunurnar fingið nógvar útreiðslur sendandi frá landinum á hvørjum ári uttan at fáa samsvarandi skattainntøkur við.

Í árunum frá 2000 – 2005 hækkaði kommunuskattaprosentið í meðal við 0.5 %, og í hesum tíðarskeiðinum varð barnaansingin kommunal burturav, umframt at kommunurnar hava verið noyddar at gera stórar íløgur m.a. í eldraøkið, skúlabygningar, infrakervið og havnir, samstundis sum landið hevur tikið stuðulin til havna- og skúlabygging heilt burtur – fyri bert at nevna nøkur dømi.

Harafturat kemur, at botnfrádrátturin í kommunuskattinum er hækkaður við 9.000 kr. frá 2000 til 2006.

At landskassans partur av skattainntøkunum er lækkaður í mun til partin kommunurnar fáa er heldur ikki satt. Kommunurnar prosentpartur av fyribilsskattinum er síðani 1996 minkaður 6-7 %, og kommunuskattatrýstið á einstaka borgaran er minkað við 1 %, meðan tað hjá landinum er vaksið við knapt 3 %. Afturat hesum kemur, at landið støðugt hevur tikið sær fleiri avgjøld.

**Nýggjar uppgávur og fíggjartørvur**

Kommunurnar hava síðani kreppuna lagt nógva orku í at gjalda skuld niður, so at tær aftur verða førar fyri at gera neyðugar íløgur, og tað er ikki fyrr enn tey allar seinastu árini, at flestu kommunur eru komnar niður um eina álíkning í skuld.

Ímeðan eru fleiri uppgávur lagdar kommununum – dýrar og dýrkandi uppgávur, ikki tí at tær eru blivnar kommunalar, men tí at landið frammanundan hevur røkt uppgávurnar so illa, at økini vóru niðurundirkomin, tá kommunurnar fingu tey; sum dømi kunnu nevnast barnaansingarøkið og barnaverndarøkið. Harafturat hevur landið nýtt høvið í sambandi við útleggingarnar at skapa fleiri lógarbindingar, og hevur sett nýggj krøv, bæði til støði, til góðsku og onnur krøv, ið gera økini tyngri og dýrari. – Tað er ivaleyst lættari hjá teimum at seta høg krøv, tá rokningin fer í kommunukassarnar.

Eitt dømi um, hvussu ábyrgdarleyst og undanstøkkandi løgtingslimir fara um skyldur landsins, er eldraøkið: Á eldraøkinum – sum er ein landsuppgáva – hevur landið í nógv ár uppá tað skammiligasta forsømt at útbyggja ellis- og røktarheim. Heldur enn at taka uppá seg at gera skaðan góðan aftur, tvinga landspolitikararnir nú kommunurnar at fíggja helvtina av tí, sum tað kostar at byggja eldraøkið út. Hóast kommunurnar ikki eiga uppgávuna, verða tær meira ella minni noyddar at fíggja helvtina av útbyggingini fyri landið, tí ongin útbygging yvir høvur verður framd í teimum økjunum, har kommunurnar ikki spæla við – og so sleppa tær annars at eiga niðurpínda økið við høvd og gørnum, tá landið um nøkur ár leggur økið út á kommunurnar.

Onnur dømi eru bókasøvnini og forsorgarøkið.

Tí er tað heilt burturvið, tá landspolitikarar siga, at kommunurnar ikki fíggjarstýra, ella at tær taka meira inn av skattepeningi enn brúk er fyri. Kommunurnar fíggjarstýra, men tað er sera trupult, tá landið á hvørjum ári í desember, tá landspolitikarar telva um fíggjarlógina, flytur nýggjar útreiðslur á kommunurnar – sum oftast eftir at freistin fyri at leggja kommunalu fíggjarætlanirnar er farin.

Kommunurnar hava ikki møguleikan at lata onkran annan fáa svartaper fyri at fáa tað at sýnast sum um, at roknistykkið hongur frægari saman, enn tað ger.

**Lovaði skattalættin hjá landsstýrinum**

Tá fíggjarmálaráðharrin í tinginum segði, at útreiðslurnar hjá kommununum bert vóru 50 mió kr. fyri økini tær fingu at umsita 1. januar 2006, so er heldur ikki tað satt.

Á fundi í fíggjarmálaráðnum 11. november í 2005 vórðu fíggjarmálaráðharrin og formenninir í kommunufeløgunum samd um, at fíggjartørvurin hjá kommununum í sambandi við yvirtøkuna av barnaverndarøkinum kostar kommununum 39 mió kr. í 2006, og stuðlarnir í dagstovnunum 13 mió kr. Tilsamans 52 mió kr.

Umframt hetta flutti landsstýrið kommununum útreiðslur til umsorgararbeiði á eldraøkinum á 2,6 mió kr. og 1,7 mió kr. fyri fólkabókasøvn.

Tilsamans góðar 56 mió. kr., svarandi til 1,1 skattaprosent.

Partarnir vóru eisini samdirum, at hækkaði botnfrádrátturin hjá kommunum á 2.000 kr. kostar kommununum slakar 13 mió. kr., sum er uml. 0.25 skattaprosent afturat teimum 1,1 %.

Umframt tað álegði landsstýrið øllum pørtum á arbeiðsmarknaðinum meirútreiðslur til barsilsskipanina – fyri kommunurnar merkir tað uml. 1,8 mió kr.

Hetta er tilsamans 72 mió kr. Lovaði skattalættin hjá landsstýrinum á 60 mió kr. minkaði sostatt við góðum vilja niður á 18 mió kr., og varð borðreiddur í eini lítið gjøgnumskygdari løgtingslóg at fjala útyvir, at so var.

Skuldu kommunurnar tikið sær fult endurgjald, var tørvur á eini hækking í kommunuskattinum á 1,4 %.

Nei, landspolitikarar hava avgjørt onki at kasta kommununum fyri á fíggjarliga økinum: Kommunurnar gjalda sína skuld niður í stórum, samstundis sum tær av neyð bera part av byrðuni fyri landið, meðan landspolitikararnir lata stór øki liggja í órøkt, samstundis sum teir við hallinum á fíggjarlógini senda rokningina fyri væntandi raðfestingar til framtíðar skattgjaldarar.